

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 03 - 2013

# Grønlendska landsstýrið - Ikki fleiri oljuloyvi fyribils

Nýggja landsstýrið í Grønlandi fer at bremsa royndunum hjá útlendskum feløgum at fáa fatur á ráevnum og boðar frá, at tað fyribils ikki verða latin nýggj leitiloyvi eftir olju. Ætlanin er eisini at seta útlendsku feløgunum krøv um at rinda royalty, og fyri stórar verkætlanir størri royalty. Eisini fer tað undir tiltøk fyri at friða nattúruna. Tað fer eisini at vera torførari at innflyta útlendska arbeiðsmegi skrivar Politiken. Við hesum vil nýggja landsstýrið vísa umheiminum, at tað fer at reka ein annan politikk á ráevnisøkinum enn tað undanfarna. Ikki øll halda hetta vera eina skilagóða gongd, tí vandi er fyri, at hetta fer at ræða útlendsku feløgini burtur. Ráevnisídnaðurin leggur stóran dent á trygg og støðug viðurskifti. Men nýggi landsstýrisformaðurin, Aleqa Hammond stendur við sítt. Hon vísir á, at tað longu eru givin nógv loyvi, og má víðari gongdin verða á einum slíkum slag og støði, at landsins stýri fær fylgt við. .